## DONG krevur avsláttur

Danska olju og natúrgass-samtakið, DONG, sum er høvuðssponsor hjá danska fótbóltslandslið, fer í næstum at krevja avsláttur frá danska fótbóltssambandinum. Hetta skal síggjast í ljósinum av, at danska landsliðið tvær ferðir á rað ikki hevur megnað at leikt seg í eitt HM ella EM-endaspæl í fótbólti. Samtøkustjórin hjá DONG, Søren Biuene sigur, at teir leggja ein ávísan stoltleika í at verða høvuðsstuðul hjá landsliðnum. - Tað er klárt, at vit vilja taka eitt kjak við DBU, um hvørt prísurin fyri stuðulsavtaluna er tann rætti, nú tá danska fótbóltslandsliðið ikki leikar seg í nøkur endaumfør longur, sigur Søren Biuene.



## Randi royndarvant í Íslandi

Málmaðurin hjá KÍ-kvinnum í fótbólti, Randi Wardum, var um vikuskiftið og royndarvandi við íslendska felagnum Vali, Venjingaruppihaldið var bert í tríggjar dagar, og tá Randi kom aftur úr Íslandi, helt hon, at tað hevði gingið rættiliga væl. – Eg haldi, at tað gekk sera væl, og felagið í Íslandi hevur eisini víst áhuga. Eg eri eisini fús at royna mínar dygdir uttanlands, sigur málmaðurin.



*Menn rinda møðina og strekkja ú, eftir lokna venjing í Kiev mánakvøldið*

*Mynd: Rólant Waag Dam*

# Mikkjal Thomassen ivasamur

**Mikkjal Thomassen hevur trupulleikar við hælsinuni og Súni Olsen er leikbannaður. Tað merkir at ein nýggjur miðvøllur skal mannast**

LANDSLIÐIÐ
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

**Kiev, Ukraina:** Mikkjal Thomasen luttók ikki í venjinginihjálandsliðnum í gjárkvøldið. Hann hevur havt trupulleikar við hælsinuni í longri tíð, og hetta hevði við sær, at hann stóð uttanfyri vøllin meðan restin vandi.

Mikkjal Thomassen varð eisini útskiftur í dystinum móti Fraklandi, og til venjingina í gjár dugdi Jógvan Martin Olsen ikki at svara fyri, hvørt Mikkjal verður klárur mikudagin ella ikki.

Greitt er tó, at Súni Olsen er leikbannaður. Her tykist Atli Danielsen at vera mest upplagdi avloysarin, meðan Tem Hansen er eitt gott boð upp á eitt alternativ til Mikkjal Thomassen.

Hvussu er og ikki, má Jógvan Martin Olsen manna miðvøllin øðrvísi enn hann gjørdi móti Fraklandi, og tá – tann í landsliðshøpi – óroyndi Rókur av Fløtum Jespersen fyri so vítt er einasti leikarin av hinum, sum kann spæla mitt á, er trupult at síggja aðra loysn upp á miðvallartrupulleikan enn omanfyri nevndu.

### Avboð, avboð og avboð

At Mikkjal er ivasamur kemur sjálvsagt illa við hjá Jógvan Martin Olsen. Avboð, skaðar og sjúka hevur havt við sær, at hann má síggja burtur frá fleiri leikarum til dystin mikudagin. Leikarar, sum annars hava verið meiri og minni fastur partur av hópinum. Hesir eru Óli Johannesen, Jákup á Borg, Pauli G. Hansen, Sámal Joensen, Ingi Højsted, Atli Danielsen og Marni Djurhuus.

Harnæst koma avboð frá Kára Nielsen, Herbert í Lon Jacobsen og Hans Paula Samuelsen, leikbannið hjá Súni Olsen og at Fróði Benjaminsen var eftir í Føroyum av persónligum áðum.

# Leikarararnir gleð

**Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari, sigur, at eitt stórtap sum tað, vit júst hava upplivað, ikki verður sópa av borðinum frá degi til dags, men at leikararnir gleða seg at koma á vøllin í annaðkvøld**

LANDSLIÐIÐ
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



**Kiev, Ukraina:** Eitt stórtap er ikki so at rista av sær. Heldur ikki tá talan er um liðið, sum liggur nummar 190 á styrkilistanum hjá FIFA og mótstøðuliðið spældi seg í seinastu HM-finaluna. Tískil var tað eisini hetta, prátið við landsliðsvenjaran í stóran mun kom snúgva seg um, tá hann var liðugur at venja sínar leikarar.

– Hetta er heilt víst ikki nakað, vit bara feia av borðinum eftir einum degi. Sjálvandi merkir tað hópin, men spælararnir gleða seg nú at koma á vøllin mikukvøldið, segði Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari.

Beint eftir dystin leygardagin viðgekk Jógvan Martin Olsen, at stóra tapið var ein beiskur biti at svølgja. Tað er tað uttan iva framvegis, men landsliðsvenjarin hevur nú sæð dystin aftur á video og gjørt sær nakrar nýggjar tankar.

– Eg helt avrikið leygardagin var øgiliga vánaligt. Tað var kenslan, eg stóð við. Men eftir at hava sæð dystin aftur síggi eg, at trý av teirra málum eru sokallað “lucky-punch”, og at vit í veruleikanum ikki áttu at tapt so nógv, vísir Jógvan Martin Olsen á og nevnir síðani stóru kjansirnar hjá Christian Lamhauge Holst, Jón Róa Jacobsen og Símun Samuelsen, har teir ikki høvdu tað hepni, sum franskmenninir høvdu við sær.

# Shevshenko á knæ fyri Blo

**Stjørnan á ukrainska landsliðnum sigur seg vóna, at landsliðsvenjarin heldur fram, hóast landið ikki megnar at vinna seg í EM-endaspælið**

LANDSLIÐIÐ
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

**Kiev, Ukraina:** Eftir at Ukraina tapti fyri Skotlandi í EM-undankappingini leygardagin, eru møguleikarnir hjá landinum at sleppa við til EM-endaspælið næsta summar farnir.

Landsliðsvenjarin Oleg Blokhin hevur áður sagt, at um hann ikki megnaði at føra liðið til endaspælið, so vildi hann lata venjarasessin til annan mann. Men tað heldur stóra stjørnan á landsliðnum, Andrej Shevchenko, er eitt vánaligt hugskot.

– Landsliðsvenjarin hevur ikki einsamallur ábyrgdina av, at vit ikki koma víðari frá bólkinum. Blokhin er maðurin aftanfyri størsta avrikið í ukrainskari fótbóltssøgu við fjórðingsfinaluni í HM, og eg vóni, at hann heldur fram sum landsliðsvenjari, sigur Shevchenko við ukrainskar miðlar undan dystinum ímóti Føroyum í morgin.

Aðrir spælarar eru ikki eins sannførdir um dygdirnar hjá Blokhin. Liverpool-spælarin Andrej Voronin hevur áður ført fram, at Blokhin bert hevur virðing fyri sær sjálvum og Shevchenko. Ein útsøgn, sum sjálvsagt ikki fall í góða